# TILTØK

**Gudstænastur**
**3. Sunnudag eftir páskir**
***Havnar kirkja:*** kl. 11, Sonja Klein
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Heri Joensen
***Argja kirkja:*** kl. 11, Bergur D. Joensen. Talvan gongur í Argja kirkju fyri Bláa Kross. Barnakór syngur
***Kaldbak:*** kl. 12, altarg., Jóannis Fonsdal
***Kvívík:*** kl. 12, Marjun Bæk
***Tjørnuvík:*** kl. 12, Mogens Tilsted Christensen
***Bøur:*** kl. 11, David Johannesen
***Funningur:*** kl. 12, messa, Emil Olsen
***Norðskáli:*** kl.12, Sverri Steinhólm
***Gøta:*** kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11, Jónsvein Bech
***Glyvrar:*** kl. 11, Meinhard Bjartalíð, altarg.
***Sjóvar kirkja:*** kl. 12, Jógvan Fríðriksson
***Æðuvík:*** kl. 17.30, Jónsvein Bech
***Fuglafjørður:*** kl. 11,
***Funningsfjørður:*** kl. 16, Uni Næs
***Sjúkrahúsið:*** kl. 10,
***Christianskirkjan:*** kl. 11,
***Kunoy:*** kl. 12.15, Hans Eiler Hammer
***Hvannasunds kirkja:*** kl. 12, altarg., Elsa Funding
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14,30, Elsa funding
***Sands kirkja:*** kl. 12, altarg., Hans J. Joensen, biskupur
***Hov:*** kl. 11,
***Sumba:*** kl. 13, Patrick de Neergaard

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti har Absalon Áargarð og Jákup Alberg Berg tosa um evnið »At seta sær fyri«. Kl. 11.30 samvera við drekka. Á tilbiðjanaðarmøtinum kl. 12 er evnið »Lívsandi Guds – partur 2« Jógvan Z. talar. Barnaansing undir møtinum.
Sunnudagsskúlin kl. 12.
Týskvøldið kl. 20 verður »Salt skeið – fjórða trin – tilbiðjan úti og heima« skeiðið heldur fram leygardagin 23. apríl frá kl. 13 til 17.
www.livdin.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*Uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Tóra Slættalíð, kl. 14 sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Møti v/Eivind Frøen.
Mikumorgun kl 7.00 bøn.
Verið øll hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting, barnaansing verður eisini.
Mánakvøld kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti, kl. 21.30 Bíbliugransking: Dánielsbók.

**Meinigheitshúsið**
Fríggjadagin kl. 19.30-21.30 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jóannis Fonsdal, Manskórið syngur.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardag kl. 16 Børn og vaksin samlast. Farið verður í ítróttarhøll til ymisk spøl. Sangur, andakt og døgurði verður í Frelsunarherinum aftaná. tilmeld. tlf. 514189. Sunnudag kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti har kapteinarnir Siggi og Ranvá Ingermarson syngja og tala. www.frelsunarherurin.fo

**Sjómanskvinnuringurin á Argjum**
samlast mánakvøldið 18. apríl kl. 20 hjá Mariu Hansen, Traðagøta 28.
Sjómanstrúboðarin verður við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og møti, Jákup Olsen talar. www.hebron.fo

**Frá Ebenezer**
Fríggjadag kl. 20 Teen-Night.
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnu-dagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Mánadag kl. 17 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjakvøldið kl. 19.30 MiniSalt.
Sunnudagin kl. 11 Familju- og morgunmøti við Sunnudagsskúla, kl. 18 Evangel. møti.
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti.
www.gospel.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Fríggjadag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Michael Bradley, prestur, í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúli kl. 14.
www.katolsk.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnudaghin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni, kl. 18 Møti í Missiónshúsinum v/ Øssur Kjølbro.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 6 Morgunbøn, kl. 20 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17 Landsbøn. Sunnudagin kl. 11 einki morgunmøti vegna hjúnabandslegu. Kl. 18 Møti við Eivind Frøen.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. www.filadelfia.fo

**Saron, Vestmanna**
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 18, luttøka verður úr Vík. Verið hjartaliga vælkomin.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Sigfred Johannesen og kl. 20.30 Ungdómsmøti.

**Meinigheitshúsið, Sandavágur**
Familjumøti fyri alla familjuna verður í kirkjuni sunnudagin kl. 16 við Jan, Nancy og Barnakórinum. Aftaná familjumøti verður ábit í Meinigheitshúsinum. Øll eru hjartaliga vælkomin. Av tí at familjumøti er, verður einki sunnukvøldsmøti.

**Filadelfia, Miðvágur**
Sunnudagin kl. 11 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Inga Magnussen talar.
Mikukvøldið kl. 20 undirvísing og bøn.

**Vágafólk**
Dýrabiðidagsstevna verður í døgunum 22.-24. apríl í bygdarhúsinum í Miðvági og missiónshúsinum Libanon í Sørvági, nærri verður lýst í komandi viku.

**Bygdarhúsið í Tjørnuvík**
Møtir og sangkvøld verður hesar dagar.
Fríggjakvøldið kl. 19 Glyvrakórið syngur og vitnar.
Leygarkvøldið kl. 19 Sangkvøld við luttøku av Magna Christiansen, Ruth og Ingibjørg Thomsen, Libanon systranar, Trioin á Soli Deo Gloria, Gulak og Jónhilda Hansen.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Snorra Brend. Mektam syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin til møtini.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Jákup Berg.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Malmberg Olsen. Barnamøti kl. 17. www.keldan.fo

**Sjómanskvinnuringurin í Runavík**
kemur saman í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum mánadagin kl. 19.30.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Konsert í Fríðrikskirkjuni**
Konsert verður í Fríðrikskirkjuni á Toftum sunnudagin 17. apríl kl. 16 við luttøku av kirkjukórinum. Á skránni verður eisini einrøddaður sangur og høvi verður at lýða á instrumentalan tónleik við cello og floytum.

**Samkoman Lívsins Orð Saltangará**
Sunnudagin er møti kl. 10.30 v/ Kára Jacobsen.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti. Øll hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og barnakórið venur aftaná.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti, har Uni Næs talar. Evnið er »Altarborðið – hví«. Thaborkórið syngur. Innsavnan til nýtt klaver.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin verður eingin sunnudagsskúli. Familjumøti verður kl. 17 og ungdómsmøti kl. 21 við Poul Jóhannesen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Hanus Lassen, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti við André Matras.
Sunnudagin kl.13.30 Sunnudagsskúla og kl.18 Møti við Eivinn Bringsberg. Evni: Jesu blóð.

**Soli Deo Gloria**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús »Ung skipa fyri«.
Sunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Osbjørn Joensen.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti við Poul Jóhannes Joensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 19 kemur ungdómurin saman.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Lovsangsmøti. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Høvi verður at geva eina gávu til Heimamissiónina í Nesvík.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti v/ Svenning av Lofti.
Leygardagin kl. 20 Møti v/ Svenning av Lofti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 20 Evangel. møti, Svenning av Lofti talar. Øll eru vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30.
Mikukvøldið 4. mai kl. 20.30 verður hugnakvøld við Marjun Bæk.
Kristi Himmalsferðardag kl. 13.00 verður føroysk gudstænasta í Háteigskirkju, Marjun Bæk prædikar. Aftaná verður boðið til kaffi á Sjómansheiminum.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Innsavnan av barnamyndum o.ø. til ólavsøkuframsýningina.**
*Mánadagur 11. apríl:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-17 Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, bobb og onnur spøl.
*Týsdagur 12. apríl:*
kl. 10-11.30 Sangur, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Hvat er føroyskt handverk? Poulina Eliasen
*Mikudagur 13. apríl:*
kl. 10-16 Binding við perlum (á stokkum nr. 2), Katrin Samuelsen. Tilm. 316491
kl. 15 Túrur út í Sandágerð
*Hósdagur 14. apríl:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-17 Boccia í kjallaranum. Bocciakappingin verður 17. apríl kl. 13.00 á Nabb
*Fríggjadagur 15. apríl:*
kl. 10-17 Hugnaløta við handarbeiði. Marita Thorsteinson

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 17. apríl verður gongutúrur úr Vestmanna til Havnar – 1. partur: Mýrarnar – Leynavatn – Kollafjarðardalur – Nykatjørn.
Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæðir og ein matpakka við. Túrurin er miðal tungur og gingið verður góðar 4 tímar. Tilmelding.

**Frá Eysturoyar Gongufelag**
Túrurin út til Svínoyar verður sunnudagin 24. apríl. Báturin fer av Leirvík kl. 8.00. Túrurin er miðal tungur. Tilmelding innan mikudagin 20. apríl kl. 15.00 á Kunningarstovunum í Eysturoy: Runavík tlf. 449449 og Fuglafjørður 444860.

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18.
*Mánadagin 11. apríl*
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
*Týsdagin 12. apríl*
Boccia
*Mikudagur 13. apríl*
Prát og sangur
*Hósdagur 14. apríl*
Vit seyma taskur til myndavevarnar v/ Rannvu Gøte
*Fríggjadagur 15. apríl*
Opið Hús

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl.- 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 3320534 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Eliaskirkjan.**
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 8 min. at ganga frá Hovedbanegården, 4 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1A, 6A, 14, 15 og 28 steðga nærhendis.
Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995 ella Albin Johannessen, tlf. 32 88 68 79.
E-mail: pr@eliaskirkjan.dk
www.eliaskirkjan.dk

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Kvinnufundur kl. 20–21.00.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/